# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Finalistarnir skulu finnast

**AB og ÍF eru á pappírinum veikara liðið, men bæði hava tey væl og virðiliga víst, at tey kunnu arga tey størru, um lagið er til tað**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Víkingur vann 2-0 á ÍF á heimavølli fyrr í ár, men talan var tá um dyst, har fuglfirðingar eins væl kundu fingið nakað í sín part*

Fyrru hálvfinalurnar í kappingini um Løgmanssteypið verða spældar í kvøld.

Í Vika á Argjum tekur AB móti verjandi greipuvinnarunum úr EB/Streymi, sum aftur í ár hava sett nøsina upp eftir greipuni. Avrikini í landskappingini hava tó ikki alla tíðina verið eins sannførandi. Og á heimavølli hevur AB roynst væl higartil, so talan verður um ongan hátt um nakran léttan dyst hjá EB/Streymi.

Og í Fløtugerði í Fuglafirði koma Víkingar á grannavitjan. ÍF hevur havt eina sera trupla byrjan upp á kappingarárið, men sjey stig í seinastu trimum dystunum tykjast hava vent gongdini. Og eingin ivi er um, at teir eisini ætla sær sigurin, nú grannarnir koma á vitjan.

Tað tekur tó ikki favorittleiklutin frá Víkingi, sum framvegis verður mett millum sterkastu liðini í Vodafone-deildini. Og hartil hevur Víkingur fyrimunin av einum eyka hvíldardegi, tá teir longu leygarkvøldið sín dyst í landskappingini.

Á Argjum verður dysturin blástur ígongd klokkan 18, meðan dysturin í Fuglafirði byrjar klokkan 18.30.



## Skjúttarnir flyta

Bogaskjúttarnir, sum skulu royna seg á Oyggjaleikum, fáa nú at vita, at kappingin er flutt til Backeberg, sum liggur norðan fyri Mariehamn. Upprunaliga skuldi annars skjótast á Baltichallen, men nú er neyðugt, at tann vøllurin verður nýttur til fótbóltskappingina, siga fyrireikararnir.

Sagt verður annars, at talan er um frálíka breyt, sum lýkur øll altjóða krøv. Vart er móti vindi frá tveimum ættum, og umstøðurnar hjá áskoðarum eru góðar, stendur í tíðindabrævinum frá leikunum.

## Breyt óstbeinið

Tá AB spældi HB sunnudagin, noyddist Jónas Stenberg av vøllinum longu um miðjan fyrra hálvleik. Eftir dystin varð staðfest, at AB-spælarin hevði brotið óstbeinið, og í gjár varð hann lagdur undir skurð. Jónas verður tí ikki partur av liðnum hjá AB tær komandi vikurnar.

## Nýggj rennibreyt

Frælsu ítróttarfólkini á Álandi hava góðar umstøður at renna upp til sítt allarbesta á Oyggjaleikunum. Fyri at betra mest møguligt um umstøðurnar er nevnliga gjørt av, at undirlagið á rennibreytini í Mariehamn skal skiftast. Eitt nýtt undirlag gevur skjótari tíðir, og so er spurningurin, um hetta fær ávirkan á talið av metum.

# Senda beinleiðis av Tórsvølli

**Rás2 verður partur av tiltakinum, tá Føroyar og Ísland spæla veteranlandsdyst leygardagin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Beinleiðis útvarping av dystinum verður nevnliga partur av leygardagsskránni hjá Rás2, sum annars eisini fer at senda bátaradio úr Vestmanna hendan dagin.

Umframt at sent verður beinleiðis, er Rás2 eisini við til at stuðla innsavnanini, sum er partur av dystinum. Peningurin frá hesum fer til barnadeildina á Landssjúkrahúsinum, og kunnu lurtarar hjá Rás2 lata sín stuðul við at senda tekstin LSH í SMS-boði til 1940.

- Vit royna støðugt at skapa spennandi radio til mongu lurtararnar hjá okkum, og vit síggja hetta sum eitt upplagt høvi at breiðka sendiflatuna. Hóast hetta ikki er ein almennur A-landsdystur, so halda vit avgjørt, at dysturin er áhugaverdur. Og kunnu vit so samstundis stuðla einum góðum endamáli, er tað bara heilt fínt, sigur Jonhard Hammer, stjóri á Rás2.